

**VERKLAGSLÓG**

*Bæði Elisabeth og maðurin, Jógvan, sáli, hava fleiri ferðir og á fleiri støðum gjørt vart við støðuna. Nú kemur so ein verklagslóg um ein tunnil á tingborð, og so vónar fólkið bara at undirtøka og peningur verður við tí*

**VANDAMIKIÐ**

*Elisabeth Nybo eigur matstovu á Viðareiði, og møtir nógvum fólkum sum illa hætta sær at koyra norður til vøkru bygdina. - Vit hava bíðað alt ov leingi eftir eini endaligari loysn, og tí má okkurt henda nú, sigur hon*

## Tunnil – men hvar?

Fleiri kanningar eru gjørdar fyri at finna fram til, hvar ein slíkur tunnil skal liggja.

Eitt uppskot er at leggja hann úr Hvannasundi og inn í Dalar, sum er eitt nógv vitjað útferðarstað um summarið, og sum av viðingum verður mett sum ein eksotisk perla um summarið. Men aðrir møguleikar eru eisini nevndir.

- Eg haldi ikki, at tunnilin skal leggjast inni í Dølum. Tað eru nógv størri fyrimunir at leggja hann so nær bygdini sum gjørligt.
- So sparir ein bæði kavaruddingina, nýgerð og viðlíkahald av Dalarvegnum. Og so sparir ein eisini ta vøkru náttúruna inni í Dølum.